**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

Løgtingsins umboðsmaður
Traðargøta
160 Argir

22. januar 2007

**Klaga um nevndararbeiðið**

Góði umboðsmaður løgtingsins,

Føroya Óðalsfelag loyvir sær við hesum at heita á umboðsmannin um at taka til viðgerðar framferð hjá arbeiðbólkinum, ið settur var at endusrskoað landbúnaðarlóggávu og landbúnaðarpoitikk, herundir serliga framferðina hjá formanninum Ara Johanneson leiðara á búnaðarstovuni og búnaðarstovuni, ið virkað hevur sum skrivstova hjá nevndini.

Føroya Óðalsfelag er av teirri fatan, at tað arbeiðsbólkar verða settir at evna til uppskot til lógarbroytingar, skapar tann arbeiðssetningur ið landsstýrismaður ella annar heimildarmyndugleiki ásetir, saman við góðum fyrisitingarsiði teir rættarligu karmarnar.

Føroya Óðalsfelag metir, at nevndin, serliga formaður og skrivstova, hava sett til viks:

- ásetingarnar í arbeiðssetninginum;
- góðan fyrisitingarsið um at leggja fundarætlan fyri nevndararbeiði, serliga at áseta nakrar fundir fram í tíðina og ikki at áseta fund, tá limur hevur boðað frá, at hann er burturstaddur;
- góðan fyrisitingarsið um at kunngera fundarskrá undan fundi;
- góðan fyrisitingarsið um at skriva og síðani góðkenna fundarfrásøgn frá hvøjum fundi;
- góðan fyrisitingarsið um at føra fundarbók og savn fyri nevndararbeiði;
- góðan fyrisitingarsið um, at nevndin ræður fyri, hvat formaður og skrivstova kunnu gera millum funda;
- góðan fyrisitingarsið um, at fundast verður ikki óformliga við einstakar limir millum funda um tað, ið viðgjørt er á nevndarfundi; og at tann viðgerð millum funda, ið loyvilig er, skal fráboðast á næstkomandi fundi og ikki kann broyta viðtøkur á fundi;
- góðan fyrisitingarsið um, at formaður og skrivstova skulu útinnna viðtøkur nevndarinnar;
- góðan fyrisitingarsið um, at formaður skal tryggja sær, at allir limir møta og boða frá sjónarmiðum sínum og teimum hjá ‘baklandi’ teirra;
- góðan fyrisitingarsið um, at minniluti hevur rætt at fáa høvi at skriva minnilutaálit;
- góðan fyrisitingarsið um, at minnilutaálit skulu leggjast fram, tá nevndin kunnar um arbeiðið sítt.

**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

Føroya Óðalsfelag heitir á umboðsmannin um at fáa til vega frá formanni nevndarinnar fundarbók ella (tá vit ikki hava sæð slíka) tað, ið man vera, av fundarskráum og fundarfrásagnum og síðani geva okkum høvi at greiða nágreiniligari frá nevndu viðurskiftum.

Føroya Óðalsfelagið heitir á løgtingsins umboðsmann um at kanna arbeiðsgongdina í bólkinum. Arbeiðið í bólkinum hevur frá byrjan veið út av lagi illa skipað, og góður fyrisitingarsiður fyri slíkt arbeiðið er brotið. Frá byrjan valdi formaðurin at bróta arbeiðssetningin og fara nógv longur enn vinnumálaráðharrin hevði ásett, fundarætlan var ongantíð løgd, uppmøting av tí sama trupul, fundir og fundarfrásagnir illa skipaðar, og roynt var bert at fáa blástemplað eina skipan, sum ger lívið lættari fyri búnaðarstovuna og letur av hondum landsins jørð uttan viðurlag og uttan at bøndur fáa fullan fyrimun av privatum ognarrætti.

Føroya Óðalsfelag hevur áhaldandi mótmælt arbeiðsgongdini í bólkinum. Millum annað kunnu vit vísa á hjáløgdu brot úr skrivum okkara.

Føroya Óðalsfelag metir, at skulu landsstýrismenn fáa nakað burturúr at seta slíkar arbeiðsbólkar, so mugu arbeiðssetningar haldast, og skulu áhugabólkar ella einstaklingar seta tíð og tilfeingi av til slíkt arbeiði, mugu teir fáa virðing og ávirkan samsvarandi góðum fyrisitingarsiði. Vit leggja dent á, at umboð okkara, bæði Kári á Rógvi og Heðin D. Poulsen hava sera drúgvar royndir í almennum nevndararbeiði at fyrireika lógaruppskot og eru ovfarnir av arbeiðslagnum í hesi nevnd.

Vinarliga

Kári á Rógvi, formaður

--

**Brot úr arbeiðssetningi, nevndin skuldi:**

- ‘Kanna møguleikarnar fyri effektivisering av búnaðarfyrisitingini.’
- ‘Kanna fyrimunir og vansar við at heimila festarum at keypa ognir, sum hoyra til festið, tó ikki innan- og uttangarðsjørð.’
- ‘Gera uppskot til lógarbroyting at heimila nevndu sølu.’
- ‘Gera uppskot til reglur um virðismeting.’
- ‘Endurskoða landbúnaðarlóggávu’
- ‘Kanna fyrimunir og vansar við at jørðin, sum hoyrir til smæstu festini – eisini leigutraðir – kann verða seld.’

Tey fýra fyrstu punktini hoyra til tann táttin, ið hevði styttri freist, hini til tann við longri freist.

**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

*Skriv 7. juli 2006:*

**Fra:** Jóhanna&Kári_áRógvi [mailto:johannaar@simnet.is]
**Sendt:** 7. juli 2006 10.37
**Til:** 'Ari Johanneson'; 'Jóanna Djurhuus'; 'Bjørn Patursson'; 'Bjørn Heygum'; 'Heðin D. Poulsen'; 'eeldevig@kallnet.fo'
**Emne:** Landbúnaður

Góðu tit,

Sum eg havi boðað Ara frá:
- mótmæla við fundarfrásøgnini (sí uppskot um broytingar)
- vit kunnu ikki taka undir við brævinum til Vinnumálaráðið
- vit taka ikki undir við uppskotinum um lóg um landbúnaðarjørð
- vit taka ikki undir við uppskotinum um landbúnaðarpolitikk

Vit kundu tikið undir við at sent vinnumálaráðnum bræv, har lagt verður upp til politiska viðgerð á landsstýrisfundi, sum síðani kann gerast grundarlag undir víðari arbeiðið nevndarinnar. Vit hava fyrr sent út uppskot til slíkt orðalag.

Vit kunnu neyvan forða formanninum í at kunna Vinnumálaráðið um gongdina í málinum, men vit biða um at tað týðiliga verður skrivað, at umboð óðalsfelagsins ikki hava tikið undir.

Vit mæla til, at drúgvur fundur verður ásettur í august við greiðari, neyvari dagsskrá.

Vinarliga

Kári á Rógvi

*Skriv 31. august 2006:*

**Fra:** Kári á Rógvi [mailto:karir@hi.is]
**Sendt:** 31. august 2006 10.53
**Til:** 'Ari Johanneson'; 'Jóanna Djurhuus'; 'Heðin D. Poulsen'; 'eeldevig@kallnet.fo'; 'Bjørn Patursson'; 'heygum@h-p.fo'
**Emne:** Óðal: nevnd at gera tilmæli til búnaðarpolitikk

Góðu tit,

Eftir at fyrbils frágreiðingin varð send landsstýrismanninum uttan at atlit vóru tikin til áheitanir okkara, hevði stýrið í óðalsfelagnum fund og gjørdi millum annað hesa samtykt:

**Samtykt:**

1. **At mótmæla arbeiðsgongdini í nevndini**, serliga leiklutinum hjá umboðnum hjá Vinnumálaráðnum, Jóannu Djurhuus, ið millum fundanna hevur lagt trýst á formannin í nevndini til at taka aðra støðu enn ta, sum kom fram undir viðgerðini á nevndarfundi.
2. **At mæla til, at festijørð verður seld á henda hátt.**
    a. At allir bóndur fáa rætt at keypa sethús og fjós.
    b. At smærri bóndur sleppa at keypa festini.
    c. At traðarfólk sleppa at keypa traðirnar.

**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

Sum fráboðað havi eg grundað á virki í nevndini higartil og viðgerð í stýri okkara gjørt hjálagda útkast til minnilutaálit

Heitt verður á aðrar nevndarlimir um heilt ella partvíst at taka undir við minnilutaálitinum. Eftir næstu fundir og møguligt samskifti um at vera saman um minnilutaálitið, verður tað endaliga orðað.

Vinarliga

Kári á Rógvi

*Skriv 20. september  2006:*

**Fra:** Kári á Rógvi [mailto:karir@hi.is]
**Sendt:** 20. september 2006 12.38
**Til:** 'Ari Johanneson'; 'Jóanna Djurhuus'; 'Bjørn Patursson'; 'eeldevig@kallnet.fo'; 'heygum@h-p.fo'
**Cc:** 'Heðin Dánialsson Poulsen'
**Emne:** Búnaðarlógir

Góðu tit,

Havi enn ikki hoyrt frá umboðnum fyri grunnin.

Sum áður fráboðað, haldi eg ikki at fundarskráin er nøktandi, heldur ikki fyriskipan annars.

Framferðin higartil, serliga í summar, er eftir mínum tykkum brot á siðvenju og góðan sið í samband við tílíkt nevdararbeiði.

Til tess at fáa greiðu á, hvussu slíkt arbeiði eigur at skipast fyrireiki eg mál at leggja fyri løgtingsins umboðsmann.

Hetta skal sjálvsagt ikki takast illa upp, men er gjørt fyri at fáa greiðu á rættarstøðuna.

Vinarliga

Kári á Rógvi

*Skriv 23. september  2006:*

**Fra:** Kári á Rógvi [mailto:kari_law@post.olivant.fo]
**Sendt:** 23. september 2006 11.31
**Til:** 'Ari Johanneson'; 'Jóanna Djurhuus'; 'Bjørn Patursson'; 'eeldevig@kallnet.fo'; 'heygum@h-p.fo'
**Cc:** 'Heðin Dánialsson Poulsen'
**Emne:** Búnaðarnevnd

Vælsignaðu tit,

Vit kunnu ikki hava fund á Mikkjalsmessu!

Eg endurtaki annars áheitan mína um at fáa uppskot um fleiri fylgjandi fundardagar, so øll kunnu seta teir av í kalendara, við uppskoti til skrá, ætlan um tilfar, osfr.

Sjálvur eri eg heima til 15. november og aftur frá 8. desember.

**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

Sum skjótast eigur nevndin at fáa senda 'svartbók', tey kalla, tvs. skjal við øllum fundarskráum og fundarfrágreiðingum higartil við tilvísingum til tilfar og annað viðkomandi, t.d. til samráðingar millum funda, áheitanir frá landsstýrismanninum og samskifti við stjórnarráðið.

Slíkt er vanlig – og neyðug – mannagongd í slíkum nevndararbeiði.

Í slíkari svartbók eigur til dømis at vera at síggja, nær nevndin gjørdi av at biða um frágreiðingina frá Magna Laksáfoss. Henda sjálvdsama, men hjartanemandi ný-merkantilisma, kann nú heldur ikki standa einsamøll, og rokni tað sum sjálvsagt, fyri tað fyrsta, at vit fáa sendandi tilfarið, sum visjónsbólkurin hevur latið úr hondum viðvíkjani búnaðarstuðlinum, umframt at vit senda búskaparráðnum frágreiðingina hjá Magna og ta hjá visjónini til ummælis, so bólkurin hevur ymiskt tilfar at vísa á og arbeiða við.

Á næsta fundi vænti eg at fasta umboðið hjá búnaðargrunninum er við, so vit fáa at hoyra, hvørja støðu grunnurin hevur, um hann hevur nakra.

Kári á Rógvi